# Russarar komnir til Suðuroyar

**Bæði í Vági og á Tvøroyri hava russisk skip ligið seinastu dagarnar og skipa um og tikið pakkitilfar**

UMSKIPING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Suðuroyingar hava seinastu árini brúkt ikki sørt av orku uppá at økja virksemið í oynni. Eitt, sum bæði tvørafólk og vágbingar hava roynt í hesum sambandi, er at fáa fremmand skip til Suðuroyar at skipa um og at leggja vøru upp.

Í hesum sambandi var fundur herfyri í Suðuroy ímillum kommunupolitikarar og vinnulívsfólk og russisk reiðarí og umboð teirra í Føroyum, Faroe Agency, um at fáa russisk skip til Suðuroyar at skipa um og kanska keypa vørur og tænastur úr Suðuroy.

Og nú sær út til, at hetta kanska er við at bera ávøkst.

Bæði í Vági og á Tvøroyri hava russisk skip ligið hesar seinastu dagarnar og umskipa svartkjaft upp í móðurskip.

Í Vági hava tveir russrar ligið og har hava teir eisini tikið pakkitilfar.

Í Vági er tað Johan Dahl, sum hevur sín leiklut í at fáa russisk skip hendavegin og hann sigur, at endamálið er at fáa teir eisini at leggja fisk upp til frystigoymsluna í Vági.

Sum er, kasta russisku skipini av sær í havnargjaldið o.s.fr., umframt at nakað av arbeiði stendst av at fáa pakkitilfar og annað, umborð.

– Men eydnast tað at fáa russisku skipini at leggja upp til frystigoymsluna, kann tað kasta rættiliga nógv arbeiði av sær.

Í morgin koma tveir russarar afturat til Vágs at skipa um.

Nú vit hava fingið nýggja samferðsluhavn í Trongisvági er havnin á Drelnesi tøk til onnur endamál og kommunan hevur gjørt fleiri royndir at fáa nyttu burturúr havnini.



*Í Vági hava tvey stór russisk skip ligið seinastu dagarnar. Myndina tók Bjarni Nygaard*

Hetta vikuskiftið hava trý russisk skip ligið á Drelnesi og skipaðu svartkjaft um. Tveir trolarar skipaðu upp í eitt móðurskip.

Eisini hetta eru russisk skip, sum Faroe Agency umboðar.

Eins og í Vági, vóna tey á Tvøroyri eisini, at hetta er nakað, sum kann vinda uppá seg.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Tvøroyrar Kommuna roynir at fáa russisk skip inn á Tvøroyri at skipa um.

Ein roynd var gjørt fyrst í nítiárunum og eisini tá vóru nøkur skip á Tvøroyri. Men tá var talan um almenn reiðarí og alt tað datt niðurfyri, tá ið Sovjett-samveldið syndraðist. Og hetta eru fyrstu russararnir, sum eru aftur á Tvøroyri.



*– Fyri fyrstu ferð í nógv ár hava russisk skip verið á Tvøroyri. Her liggja trý skip á Drelnesi og skipa um. Myndina tók Bjarni Nygaard*

# Danskir politikarar vita ov lítið um Føroyar

**Misskiljingar standast av vantandi innliti í føroysk viðurskifti, heldur Pia Larsen, forkvinna í 21-mannanevndini, ið varð sett at taka sær av føroyskum viðurskiftum í sambandi við fullveldissamráðingarnar. Nú skal nevndin fremja sátt og semju millum danir og føroyingar**

CHRISTIANSBORG
*Marjun Dalsgaard*



*Pia Larsen úr vinstraflokkinum vónar at síggja Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg í 21-mannanevndini, sum nú er eitt slag av vinarnevnd, ið skal fremja forstáilsi millum føroyskar og danskar politkkarar*

**21-mannanevndin hevur verið innihaldstóm, síðan landsstýrið slepti loysingini, og tí skal hon framyvir vera eitt slag av vinanevnd, sum skal fremja størri forstáilsi millum partarnar.**

Fyri nøkrum árum síðani, tá Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg fóru til Danmarkar at samráðast um fullveldi, var 21-mannanevndin sett. Her vórðu ymisk evni viðgjørd í sambandi við samráðingarnar, og nevndin kundi tykjast sum ein forðing fyri beinleiðis sambandi við stjórnina. Høgni Hoydal hevur verið ímóti, at nevndin virkaði, tí hann sá hana sum eitt parkeringspláss, har evnir vórðu parkeraði, ístaðin fyri at vera viðgjørd.

Forkvinnan í nevndini, Pia Larsen úr Vinstraflokkinum, sigur, at nú fullveldið ikki er so aktuelt longur, hevur hon roynt at definera uppgávuna hjá nevndini av nýggjum, heldur enn at niðurleggja nevndina.

- Nevndin varð sett at taka sær av málum í sambandið við fullveldisætlanina hjá føroyska landsstýrinum. Nú eru ikki so nógv politisk mál at taka støðu til í nevndini, men ístaðin fyri at niðurleggja hana, havi eg roynt at broytt hana til eitt stað, har danskir og føroyskir politikarar kunnu tosa saman, sigur Pia Larsen.

## Vinanevnd

Pia Larsen heldur, at danskir politikarir - kanska serliga teir nýggju - vita ikki nóg nógv um føroysk viðurskifti. Tað, teir vita, fáa teir gjøgnum fjølmiðlarnar og nøkur fá orðaskifti í fólkatingssalinum, tað heldur hon ikki vera nóg gott.

- Hóast vit øll duga danskt, tosa vit ikki sama mál. Misskiljingar eru ofta orsøkin, tá kegl og truplleikar eru millum føroyingar og danir. Tí haldi eg, at vit skulu brúka 21-mannanevndina til eitt forum, har danir og føroyingar kunnu skapa kontaktir og læra eitt sindur um hvønn annan, sigur Pia Larsen og leggur aftrat í skemti:

- Tú kanst kalla tað eitt vinafelag.

21-mannanevndin var á vitjan í Føroyum í 2003, og løgtinginsins Uttanlandsnevnd hevur somuleiðis verið í Danmark á vitjan hjá 21-mannanevndini. Pia Larsen heldur, at hetta hevur verið væleydnað og vónar at Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal fara at taka fastar sessir í 21-mannanevndini.

- Til dømis kjakaðust við um fiskivinnu og danskir politikarir fingu høvi at seta seg inn í nøkur ser-føroysk viðurskifti. Eg veit til dømis, at Johan Dahl (úr sambandsflokkinum), sum var formaður fyri Uttanlandsnevndina, helt, at tað var eitt gott tiltak, og vit ætla at endurtaka tað í, sigur Pia Larsen. 21-mannavenvndin kemur væntandi til Føroyar í summar.

21-mannanevndin hevur ikki havt nakrar fundir í longri tíð. Nú er ætlanin at hava ein fund um árið, men forkvinnan leggur dent á, at tað ikki bara er hugnaprát.

- Tað er sjálvsagt ikki soleiðis, at vit bara sita og sussa og so siga: Farvæl - vit síggjast um eitt ár. Vit skriva eina frágreiðing, um hvørji evni vit viðgera, eins og eg kunni forsætismálaráðharran um, hvat vit tosa um, so nakað ítøkiligt kemur burturúr.

## Vónar at síggja Høgna og Anfinn

Høgni Hoydal hevur ikki verið limur í 21-mannanevndini hetta tíðarskeiði, hann hevur verið í fólkatinginum.

- Eg havi ikki verið áhugaður í at vera í 21-mannanevndini, av tí at eingi mál hava verið viðgjørd har, tó hevur Lars-Emil Johansen verið í nevndini vegna Norðuratlantsbólkin, sigur Høgni og leggur aftrat, at Norðuratlantsbólkurin fyrr hevur skotið upp, at ein nevnd verður sett, sum viðger øll føroysk og grønlendsk mál ístaðin fyri, at tey verða viðgjørd í fleiri ymiskum nevndum. Hann heldur tó, at fyrimunir og vansar eru við báðum og sigur, at teir hava ikki reiðiliga tikið støðu til tað enn. Sum er, verða flestu føroysku mál viðgjørd í Politisku-búskaparligu nevndini.

Pia Larsen vónar tó at síggja Høgna og Anfinn.

- Eg dugi at skilja, um Høgni ikki vil vera við av politiskum orsøkum, men eg vænti at Anfinn Kallsberg fegin vil vera við. Í øllum førum ætli eg mær at bjóða teimum báðum fastar sessir í 21-mannanevndini og vóni at síggja teir, sigur Pia Larsen.